*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

SAMBAND
MAGGI GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# NØVN

Tórhavnar alfrøði:

# Pylsuvognar í yvir 70 ár



*Myndin er frá 1962, og vísir hon pylsuvognin hjá Bent. Sum tað sæst á myndini, so var útboðið stórt. Teksturin á vogninum er á bæði enskum, donskum og føroyskum*



*Myndin er frá 1962, og vísir hon pylsovognin hjá Heina. Leggið merkið til, at mótin við føroysku troyggjunum, sum tá var, nú er við at koma aftur í býarmyndina*

**Ein partur av Havnarsøgu eru teir sokallaðu pylsuvognanir. Í dag hava vit eina stutta grein við myndum, sum lýsa ein part av søguni. Eisini fara vit at heita á fólk um at koma við upplýsingum og myndum**

## PYLSUVOGNAR

Á Ólavsøku í ár, eru tað 71 ár síðani fyrsti pylsuvognurin sást á Havnargøtum.

Í 1935 søkti frú A. C. Djurhuus býráðið um loyvi at selja heitar pylsur á gøtuni um ólavsøkuna. Eftir at býráðið hevði viðgjørt umsøknina, varð henni játtað søluloyvi. Um frú A. C. Djurhuus bert hevði pylsuvognin ta einu Ólavsøkuna, vita vit ikki. (Veit nakar hvør frú A. C. Djurhuus var ?)

Annar pylsuvognurin sum kom til Havnar, var tann hjá Heina Jacobsen, „Heina í Kjøt“ sum hann varð róptur, tann pylsivognurin kom í 1946. Heini Jacobsen keypti pylsuvognin frá donsku fyritøkuni „Holberg“, hetta var ein sokallaður „ein manns pylsuvognur“ á hjólum, pláss var bert fyri einum persóni inni í vogninum. Tey fyrstu nógvu árini var pylsuvognurin bert opin dansikvøld og so á ólavsøku, sjálvandi. Vanliga stóð pylsuvognurin á horninum Áarvegur/Tinghúsvegur, framvið garðinum hjá Lützen, men á ólavsøku ráddi um at vera har fólkið var, og tí var Heini í Gundadali, tá fótbóltur var, og á bryggjuni meðan kappróðurin var.

Í 1958 lat Andreas Johansen, róptur „Lítli“ og seinni Emly Johannesen upp pylsuvogn í Kommunuskúlagarðinum (tað er har sum parkeringsøkið oman fyri Býráðshúsini er í dag).

So hvørt sum pylsuvognarnir blivu fleiri, vaks útboðið. Frá 1935 og til 1958 var bert møguleiki at keypa kókaðar pylsur (tey fyrstu árini bert við sinnop, ketchup kom ikki fyrr enn seinni), men í 1959 komu steiktu pylsurnar eisini. Sum tíðin leið øktist útboðið, her skal nevnast, at í 1967 varð fyri fyrstu ferð steiktur „kyllingur“ at fáa.

Í 1960 bleiv ungdómurin í Havn „amerikaniseraður“. Danin Bent Lynge Olsen lat upp fyrsta „búff“ vognin í Havnini, og fyri fyrstu ferð kundu havnarfólk keypa „búff“ og „Coca-Cola“ (cola kom fyrstu ferð til landið í 1960). „Búffvognurin hjá Bent“ (soleiðis bleiv hann róptur millum havnarfólk) stóð framman fyri Gamla Kommunuskúlan (har sum traðarmaðurin stendur í dag).

Í 60-unum bleiv býtt eitt sindur um uppá teir ymisku pylsuvognarnar, eina tíð stóðu ikki minni enn tveir pylsuvognar framman fyri „Gamla Kommunuskúlan“.

Tá Tórshavnar Býráð í 1969 tók stig til at fríðka um økið framman fyri „Gamla Kommunuskúlan“, blivu teir báðir pylsuvognarnir sum har stóðu, fluttir oman á keiøkið, nakað framman fyri „Stefanson's hús“, og seinni aftur bleiv tann eini vognurin fluttur longur út á havnaøkið, har hann stendur enn.

Hettar var ein partur av søguni um pylsuvognarnar í Havn.

Uttan iva eru tað nógv fólk av bygd, sum í dag minnast aftur á teir dagar, tá tey sum børn fóru til Havnar á ólavsøku, og hæddarpunktið vóru tær reyðu pylsurnar á Vaglinum. Um onkur hevur viðmerkingar, so ring til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

PYLSUVOGNAR ER IKKI NAKAÐ FÓLK VANLIGA TAKA MYND AV, TÍ ER TAÐ ILLA STATT VIÐ PYLSUVOGNAMYNDUM Í HAVN. EG FARI AT HEITA Á FÓLK Í BÝ OG Á BYGD, UM AT SIGA FRÁ, UM TEY MØGULIGA HAVA ONKRA MYND, HAR PYLSUVOGNAR AV EINARI ELLA AÐRARI ORSØK HAVA SNÍKT SEG UPPÁ MYNDINA. UM SO ER AT ONKUR EIGUR EINA SLÍKA MYND, SO RING ENDILIGA á tlf. 314647 ella 214647.

**Dagurin í morgin**

25. juli: Jákupsdagur.
Dagurin verður hildin til minnis um tann ápostulin, sum verður róptur Jákup tann Eldri. Hann var sonur Sebedeusar og bróðir Jóhannesar. Hann var tann fyrsti av ápostlulnum, sum varð tikin av døgum fyri trúgv sína (Ápostlasøgan 12, 1-2).

Halgisøgan sigur frá, at fyri deyða sín hevði Jákup verið ferð í Spaniu, og har varð hann eisini jarðaður. Vælt verður um bein hansara í kirkjuni Santago de Compostela Í Galisiu í Norðurspaniu. Henda krikjan var ein av teimum støðunum, har flestir pílagrímar virjaðu í miðøldini. Jákup sjálvur er eisini ofta avmyndaður sum pílagrímur, m.a. træskurðurin av honum á einum av kirkjubøstólunum; har sæst hann við pílagrísmsstavi í hendi og undir hatti, sum er prýddur við tí skeilini, sum í Føroyum fekk navnið, jákupsskel.

Eisini er eitt føroyskt kvæði um, tá ið hann skal kristna Garsialand, ið er føroyska navnið á Galisiu í Norðurspanaiu.

Santa Jákup tekur í Várharra hon:
- drívur døgg, fellur nú ríman -
Tú lova mær at kristna Garsialand

Týdningurin av navninum Jákup er ókendur, men teir halda, a ttað upprunaliga kemur av einum orði, ið merkir, Guð verjir. Bíbilsku frásøgurnar siga, at hann er tann, sum lumpar tvíburabróður sín Esau: tá ið teir vórðu føddir, helt hann um hælin á bróður sínum; og eisini verður sipað til, at hann vann sær frumburðarrættin frá Esau fyri ein ertnastam, og at hann lumpaði signingina frá faðirinum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jansy Feilberg, Fuglafjørður**, fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju týsdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jansy, kunnu lata eina gávu til Heimið á Mýrunum, Runavík; konta í Føroya Sparikassa.

**70 ár**
Mánadagin 31. juli verður Pauli Lassen, Vágur, 70 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst heima hjá Oluffu og Búgva

**80 ár**
Týsdagin 25. juli verður Mejnhardt Hansen, diakonur, á Nesi 80 ár. Føðingardagurin verður hildin frá kl. 19 hjá Dávid Reinert Hansen á Oyri.

**Prógv**
Salmina Arnoldson hevur tann 5. juli 2006 lokið prógv sum Bachelor of Law (LLB Honours) við University of Aberdeen.





**Christian Fróði Djurhuus**
**tórshafn**
**null-sjey-tveyogtjúgu-fram**

# Betwixed

O, use me then, my Saviour, and inpart
me into council with the whole of heart.
I'm poor and I'm alone, quicken my soul,
and save me from this wordliness of foul.

O, take my heart and make it ever new,
in steadfastness and confidence, in You.
My love and all mine powers, spread abroad,
the lost bewildered men, lead with thy rod.

And when I come refreshed of all the years
from agony of suffering and tears:
In thankful praises sing you a new song,
I know You will return: It want be long.